# Jólabøkur sum flokssett í Námi

Pilkington, Brian

**Besta jólagávan**

Tollaksmessudag hevur jólamaðurin fingið krím og orkar ikki at reisa seg, so Harry, sum líkist jólamanninum, má fara við gávunum. Sjálvt um hann gevur sær tíð til at spæla við børnini, klárar hann alt.

Floksstig: 1. – 3. (Myndabók)

Síðutal: 26




Capek, Jindra

**Eitt barn er føtt ... : jólahalgisøga úr gomlum døgum**

Hetta er haldisøgan um teir stjørnutýðararnar, sum fylgja eftir stjørnuni. Stjørnan hevur sagt teimum, at eitt barn er føtt, sum er at broyta heimin.

Floksstig: 1. – 3. (Myndabók)

Síðutal: 26




Widmark, Martin

**Gistingarhúsgátan**

Sjálvan jólaaftan fer hin fína familjan Åkerø á gistingarhús. Starvsfólkið fyrireikar eina stóra jólaveitslu, men so verða trupulleikar, og Lassi og Maia mugu enn eina ferð til at loysa eitt sera torført mál.

Floksstig: 1. – 3. (Myndabók)

Síðutal: 72




Arro, Lena

**Gubbagreytur og jólastjørnur**

Brøðurnir Bursin og Lukas búgva tveireinir á nesinum. Teir liva í sátt og semju - men á hvørjum ári undan jólum fer Bursin at garta um, at hann ikki vil halda jól. Og so má Lukas finna upp á ráð.

Floksstig: 1. – 3. (Myndabók)

Síðutal: 26



Simon, Francesca

**Herviligi Henry heldur jól**

Inniheldur fýra stuttar søgur um Herviliga Henry: Jólaframførslan hjá Herviliga Henry ; Jólagávurnar hjá Herviliga Henry ; Herviligi Henry setir fellu fyri jólamannin ; Jóladøgurðin hjá Herviliga Henry.

Floksstig: 1. – 3.

Síðutal: 106




---

Bilsen, Riat van

**Hin besta gávan**

Lítli prinsurin Iranus fer, eins og teir tríggir vísu menninir, at geva nýføddа barninum gávur, men á vegnum møtir hann øðrum, sum treingja til gávurnar, so hann gevur allar burtur.

Floksstig: 1. – 3. (Myndabók)

Síðutal: 26




---

Bollinger, Max

**Hirðaljóð: ein halgisøga um advent fyri børn og vaksin**

Tá ið Jesusbarnið verður føtt, finnur lítli floytuspælandi hirðin útav, at tað finst størri ríkidømi enn gull, silvur og heiður.

Floksstig: 1. – 3. (Myndabók)

Síðutal: 26




---

Lindgren, Astrid

**Hygg, Dikka, hygg, tað kavar!**

Lisabeth, lítlasystir Dikku, fer á ein ikki so umhugsaðan túr við hestasletu, og so stendur hon knappliga einsamøll í kavanum á einum vegi langt inni í skóginum.

Floksstig: 1. – 3. (Myndabók)

Síðutal: 32




---

Lindgren, Astrid

**Jólafrí er gott hugskot, segði Dikka**

Dikka fær fyri fyrstu ferð jólafrí, og hiema á Juniheyggi stákast tey til jóla. Áin er fryst og Dikka og Lisabeth gera sær akibreytir á ísinum.

Floksstig 1. – 3.

Síðutal: 60




---

Anne Mortimer

**Jólini hjá Sólju**

Kettan Sólja leggur einki í jólini. Øll hava so nógv um at vera, og ongin hugsar um hana. Man jólamaðurin hava eina gávu til hennara?

Floksstig: 1. – 3. (Myndabók)

Síðutal: 26



Stein, Monica

**Loyniligur jólaaftan hjá vættrunum**

Søga um seks syskin, sum møta nøkrum vættrum í einum gomlum slotti. Vættrarnir eru fittir og klókir, men teir krevja, at børnini aldrin mugu siga nøkrum um teir.

Floksstig 1. – 3. (Myndabók)
Síðutal: 32




---

Beskow, Elsa

**Óli vitjar vetur**

Tá ið Óli fyrstu ferð er úti og roynir skíðirnar møtir hann Rím-abbanum, sum tekur hann við sær til gandaðu høllina hjá konginum Vetri.

Floksstig: 1. – 3. (Myndabók)
Síðutal: 29




---

Nordqvist, Sven

**Pettson fær vitjan á jólum**

Pettson gamli og fressurin Findus eru farnir at stákast til jóla, men tá ið teir skulu fara at fella jólatræið og keypa jólamat, hendir nakað ræðuligt. Pettson dettur og meiðir sær fótin so illa, at hann ikki sleppur av fetanum. Nú eru góð ráð dýr. Men tíbetur hava teir báðir nógvar góðar grannar, sum koma at vitja og taka eina hond í.

Floksstig: 1. – 3. (Myndabók)
Síðutal: 26




---

Lindgren, Astrid

**Søgur úr Dundurdali**

Í Dundurdali búgva sjey børn. Tey spæla næstan altíð, og ikki gongur tað altíð so friðarliga fyri seg. Helst má okkurt henda alla tíðina, og tað ger tað! Her sigur Rúna frá, hvussu tey funnu uppá at hava barnafagnað. Um várið leypa tey av takinum á brenni-skúrinum og ríða á tarvinum. Og tá ið jólini nærkast, kemur tíðin við siropskøkum, gávum og veitslu.

Floksstig: 1. – 3. (Myndabók)
Síðutal: 80



Øyen, Wenche

## Gleðilig jól

Søgan um hvussu heimsins kendasti jólasálmur "Gleðilig jól" varð yrktur jólaaftan 1818 í fátæku tyrolarabygdini Obendorf. Presturin í býnum pastor Mohr yrkti orðini og organisturin Franz Gruber gjørdi lagið.
Floksstig: 4. – 6. (Myndabók)
Síðurtal: 34




Krenzer, Rolf

## Søgan um jólaklokkuna

Rakul úr Betlehem hevur funnið eina silvurklokku. Tá ið einglar bera gleðiboðini, at eitt barn er føtt í einum fjósi, veit Rakul, hví hon hevur funnið klokkuna.
Floksstig: 4. – 6.
Síðutal: 26




Lindgren, Astrid

## Vit hava tað stuttligt í Dundurdali

Søgur um seks børn, sum búgva í Dundurdali. Lisa sigur frá um tá ið hon fekk eitt lamb, sum fór við í skúla, um leysu tonnina hjá Óla, um ta ferðina tá ið Lassi fangaði uroksar, um Kirsebærkompagniet, Sankta Hans kvøld og um tá ið Anno og hon royndu seg sum barnagentur.
Floksstig: 4. – 6.
Síðutal: 133




Dickens, Charles

## Eitt jólaævintýr

Tann gírigi og hjartaharði handilsmaðurin Scrooge legði einki í jólini. Jólaljós og lýsandi barnaeygu kunni ikki gleða hann. Jólanátt fær hann vitjan av einum spøkilsi, sum spáar honum ein ringan enda, broytir hann ikki lív sítt.
Floksstig: 7. – 9.
Síðutal: 73




Gaarder, Jostein

## Jólagátan

Ein gandakendur jólakaldendari sigur søguna um eina lítla norska gentu, sum hvarv ein dagin í desember í 1984. Hon fer eina sjáldsama ferð aftur í tíðina til ár 0 og uppruna jólanna.
Floksstig: 6. – 9.
Síðutal: 233

